# Molde tapti fyri fyrstu ferð


Jákup Mikkelsen

**Kappingarneytin hjá Jákupi Mikkelsen fekk einki serligt skoðsmál fyri avrikið, tá Molde tapti 3–1 á Ullevaal**

TIPPELIGAN
*Jóannes Hansen*

Mikukvøldið tapti Molde FK fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum. Teir vóru í Oslo, har Lyn á tjóðarvøllinum Ullevaal vann 3–1. Molde var væl við í 1. hálvleiki, og í 11. minutti komu teir á odda, men seks minuttir seinni javnaði heimaliðið, og í 2. hálvleiki skoraðu teir tvey mál afturar.

Jákup Mikkelsen var aftur hesa ferð á beinkinum. Dystarvenjingina fær hann á næstbesta liðnum. Týskvøldið spældu teir í Tønsberg, har úrslitið var 1–1.

Føroyski áhugin fyri norskum fótbólti er kýttur at, hvussu tað gongst hjá Jákupi Mikkelsen. At hann ikki er á besta liðnum hjá Molde kemst av, at venjarin higartil hevur hildið seg til hin málverjan, Eddie Gustafsson. Hann var aftur millum stólparnar mikukvøldið, men hesa ferð er skoðsmálið einki serligt. Norsku fjølmiðlarnir halda, at hann var ikki sakarleysur, tá Lyn javnaði, og teir halda eisini, at hann átti sín part í síðsta málinum.

Um hetta fer at hava avleiðingar fyri málverjuplássið hjá Molde ber sjálvandi ikki til at siga nakað um. Tað ber til at ímynda sær, at ikki serliga sannførandi avrik hjá svenska málverjanum fer at hava við sær, at hann ikki verður úttikin til HM kappingina, og tað hevði ikki verið serliga heppið fyri Jákup Mikkelsen.

## Rosenborg vann

Eftir eina sera trilvandi byrjan eydnaðist tað Rosenborg at vinna. Teir vitjaðu Lillestrøm og fóru norður aftur til Tróndheim við teptum 1–0 sigri. Tað kom heilt væl við hjá oddaliðnum.

Brann hevði í Bergen vitjan úr Oslo. Vålerengen fór til hús aftur við 4–0 sigri, og nú hongur Teitur Þordarson í kløunum tráði. Men hann sigur seg ikki hava mist mótið.

Gamla Føroya felagið, Sogndal, hevði vitjan úr Bodø. Og tað eydnaðist enn eina ferð Bodø/Glimt at vinna og harvið at varðveita oddasessin. Hesa ferð vunnu teir 2–0, og fótbóltslagið í Norðurnoregi er framúr gott.

Hini úrslitini vóru hesi: Viking–Moss 4–1, Stabæk–Bryne 2–1 og Odd Greenland–Start 2–0.

# Brøndby kiksaði aftur

**Nú er tað bara málúrtøkan, sum heldur FCK frá oddasessinum, sum Brøndby hevur átt, síðani fyrsta umfarið**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað eru trý umfør eftir at superliguni, og tað er so spennandi sum ongantíð áður. Brøndby hevur verið oddalið alla tíðina. Nú resta trý umfør, og teir gulu og bláu eru fremvegis oddalið. Men munurin aftur til FCK er lítil. Bæði liðini hava 62 stig. Brøndby hevur +26 mál, og FCK hevur +21 mál.

Umframt innanhýsis stórdystin í Parkini annan sunnudag er skráin henda: Brøndby skal sunnudagin spæla á heimavølli ímóti OB, og í síðstu umfarinum bíða trý ókeypis stig, tí tá fáa teir vitjan av Lyngby. FCK skal spæla í Århus sunnudagin, og í síðsta umfarinum skulu teir spæla í Ålborg.

Mikukvøldið fekk Brøndby bara eitt stig í Viborg. Teir komu á odda, tá ein lítil hálvur tími var farin. Viborg javnaði eina lítla løtu seinni, og heimaliðið hevði meiri spæl og størri møguleikar. At Brøndby fekk eitt stig burturúr, skulu teir fyrst og fremst takka málverjanum, Mogens Krogh, fyri. Hann var ein sannur brandur.

Hetta var fyrsta ferðin, síðani Tom Køhlert gjørdist venjari, at Brøndby ikki vann. Sunnudagin standa teir aftur fyri stórari avbjóðing. Tá fáa teir vitjan av OB, sum hevur staðið seg sera væl í vár. Mikukvøldið vann OB 5–0 á heimavølli ímóti niðurflytingarhótta AGF. Stóri maðurin hjá OB var toppskjúttin í superliguni, Kasper Dalgas. Fyrrverandi Vejle spælarin skoraði trý tey fyrstu málini. Hetta var triðja ferðin í hesum kappingarárinum, at hann skoraði hattrikk.

## Einki serligt

Avrikið hjá FCK í Parkini var einki serligt. Í fyrra hálvleiki kom einki mál. Tættast við var Todi Jónsson, tá hann úr stórari fjarstøðu sendi rimmar langskot í stólparótina.

Fýra minuttir eftir steðgin varð Klaus Eskildsen vístur av vøllinum. Hann fekk gult kort fyri at fella ikki serliga eyðsýnda Zuma, og tá hann framman undan hevði fingið eitt gult kort, kom reyða kortið úr dómaralummanum.

Vejle stríddist manniliga, sjálvt um teir mistu ein mann. Teir vóru óhepnir at gera sjálvmál í 65. minutti, men fimm minuttir seinni javnaðu teir. Kern Lyhne smekkaði flatt úr 16 metrum, eftir hornaspark og út frá bólt. Og so var tað Todi Jónsson gjørdi um seg.

## AaB steðgað upp

AaB tapti sunnudagin 1–0 á heimavølli ímóti FCM. Mikukvøldið var AaB í Gladsaxe. AB, sum sunnudagin legði rygg til 5–0 tap ímóti Brøndby, vann 1–0. Tað hevur gingið syndarliga illa hjá AaB í vár. Eftir at hava verið við í stríðnum um DM eru teir nú dotnir niður á fimta plássið. Trýstið á venjaran er økt, men í leiðsluni undirstrika teir, at Peter Rudbæk verður eisini venjari sunnudagin.

Burtursæð frá svipsaranum í Brøndby sunnudagin hava teir í AB staðið seg væl á vøllinum í vár. Verri var við skriviborðsbrølaranum í dystinum ímóti Vejle.

FCM er so mikið væl fyri, at teir eru við í kappingini um bronsuna, og tað eru góðir møguleikar fyri, at teir annað árið á rað fara at spæla seg í UEFA Cup. Mikukvøldið vóru teir í Silkeborg, har heimaliðið stríðist fyri lívinum í bestu deildini. Dysturin var sera undirhaldandi, og FCM vann 3–2.

Esbjerg var í Lyngby. Gestirnir høvdu bóltin nógv størsta partin av tíðini, og teir skoraðu tvey mál.



# FSF røkir áhugamálini hjá øllum


*Niclas Davidsen sigur, at tað kemur eitt sindur illa við, at dystirnir eru fluttir, men hann góðtekur broytingarnar hjá FSF*

**Formaðurin í B68 ásannar, at tað er komið eitt sindur illa við hjá teimum, at teir nú skulu spæla ímóti GÍ og ikki HB, men hann dugir væl at skilja, at teir í FSF hava verið noyddir at gera broytingar**

SKÁIN
*Jóannes Hansen*

Ein av teimum, sum hevur verið longst uppií leiðsluni av einum føroyskum fótbóltsfelag, er Niclas Davidsen. Síðani 1973 hevur hann havt við fótbóltin á Toftum at gera.

Hann sigur seg harmast um, at tað hevur verið neyðugt at broyta skránna fyri fyrsta umfarið. Men í sama andadrátti sigur hann seg skilja og góðtaka, at tað hevur verið neyðugt við broytingum.

– Vit hava í fleiri vikur fyrireikað okkum til at spæla ímóti HB. Tí kom tað illa við, tá vit mikukvøldið fingu at vita, at vit skulu spæla ímóti GÍ og ikki HB. Fyrireikingarnar hava eitt nú verið at gera leikskránna. Venjingin hevur eisini borið dám av, at vit skuldu spæla ímóti HB. Akkurát tá eg fekk boðini um, at skráin var broytt, var venjarin hjá okkum í Gundadali og hugdi at steypadystinum millum HB og B36. Tað var hann sjálvandi, tí vit skuldu spæla móti HB sunnudagin.

*Men tit spæla ímóti GÍ?*

– Sjálvandi gera vit tað, og tíbetur hevur Hestprent, sum ger leikskránna hjá okkum verið lagaligt. Tað vil siga, at vit fáa broytt leikskránna, so hon verður fyri dystin B68-GÍ og ikki B68-HB.

Niclas Davidsen harmast vegna venjaran og spælararnar, at broytingar eru gjørdar, men hann góðtekur tær fult og heilt, og tað gera hini feløgini eisini.

– Tað snýr seg um at fáa dystirnar spældar. Eg havi skilt, at tað eru so nógv fyrilit, sum skulu takast, tá dystirnar eru fluttir. Eitt er, at tað skal passa saman við, at liðini framvegis hava heimadystir, tá stevnurnar hjá teimum eru. Hetta mugu teir í FSF hugsa meiri um, enn vit gera, sum fyrst og fremst hava okkara dystir at ganga uppí. Vónandi verður verkfallið av skjótt, so alt kemur í rættlag aftur, endar spakføri B68 formaðurin.

# Fótbólturin kollsiglir av verkfallinum

**FSF hevur býtt fyrsta og sætta umfarið um, tí tað er so torført at ferðast um Suðuroyarfjørð**

SKRÁIN
*Jóannes Hansen*

Fyrsta umfariðí landskappingini í fótbólti er á skránni í vikuskiftinum. Og longu frammanundan, at sjøtul er settur á kappingina, eru FSF og feløgini í stórum trupulleikum.

Talan er ikki um innanhýsis og sjálvgjørdar trupulleikar. Heldur eru tað trupulleikar, sum standast av verkfallinum hjá yvirmonnunum á brúnni á strandferðsluskipunum.

Verkfallið hevur við sær, at tað er sera torført at ferðast um Suðuroyarfjørð. Tí hevur FSF gjørt av at broyta fyrsta umfarið í landskappingini. Í 1. deild er sætta umfarið flutt til fyrsta umfar, og fyrsta umfarið er so flutt til sætta umfar. At tað júst er sætta umfarið, sum er flutt fram, kemst av at í tí umfarinum skuldu TB og VB spæla innanhýsis. Nú sær fyrsta umfarið soleiðis út: KÍ-B36, B68-GÍ, HB-NSÍ, TB-VB og EB/Streymur-Skála. Sambært kappingarskipanini skuldi tað verið spælt soleiðis í fyrsta umfarinum: KÍ-Skála, B68-HB, GÍ-VB, B36-NSÍ og TB-EB/-Streymur.


*Niclas Davidsen sigur, at tað kemur eitt sindur illa við, at dystirnir eru fluttir, men hann góðtekur broytingarnar hjá FSF*

## Einki annað at gera

Karl Vidtfeldt er formaður í kappingarnevndini og kappingarstjóri í bæði ungdómsdeildunum og vaksnamannadeildunum:

– Vit vónaðu at verkfallið fór at vera liðugt, men mikudagin vóru vit noyddir at fyrihalda okkum til støðuna, sum hon er. Vit hava tosað við Skipara- og navigatørfelagið fyri at fáa undantaksloyvi at flyta ítróttarfólk, men tað var ikki talingur um. Vit hava arbeitt við øðrum flutningsmøguleikum enn Strandfeðsluni, men tað hevur eisini verið trupult. Og tað er eisini mark fyri, hvat FSF og feløgini kunnu taka ábyrgdina av. Hugsa bara um støðuna, sum B36 var í, tá teir næstsíðsta vikuskifti noyddust at venda aftur til Suðuroyar.

Tað er við hesum veruleikanum í huga, at teir í FSF hava gjørt av at umleggja kappingina:

– Um vit einki høvdu gjørt, so hevði kappingin haltað og tað kundi verið neyðugt at spælt í summarfrítíðini og út í oktober mánað. Vit eru fult greiðir yvir, at avgerðin um broytingar kemur illa við feløgunum, venjarunum og spælarunum, men hetta er tað, sum vit halda tænir fótbóltinum best, sigur Karl Vidtfeldt, sum hevur havt lítla tíð at reka sítt egna virki í hesi vikuni.

*Hvat gera tit, um verkfallið heldur fram?*

– Ta støðuna mugu vit taka upp í komandi viku, um tað framvegis verður verkfall. Men tað sigur seg sjálvt, at talan verður um eina sera óhepna støðu, sum tað verður ilt at hava tak á, um fleiri vikuskifti fara, uttan at skipini fara at sigla. Trygdin hjá teimum, sum ferðast telur sjálvsagt mest. Men vit kunnu heldur ikki síggja burtur frá, at prísirnir fyri ferðingina kunnu gerast nakrir aðrir, enn teir høvdu verið, um einki verkfall var, sigur Karl Vidtfeldt.

Umframt í 1. deild eru broytingar eisini gjørdar í hinum deildunum. Í 2. deild er skráin broytt soleiðis: B71-NSÍ, B36-HB, Sumba-VB, ÍF-KÍ og LÍF-FS Vágar. Har skuldi dystirnir havt verið hesir: B36-B71, Sumba-LÍF, ÍF-NSÍ, KÍ-FS Vágar og VB-HB.

– Í yngru deildunum hava vit ikki gjørt stórar broytingar. Har verður spælt sambært skipanini, har tað ber til. So mugu vit gera upp, hvar vit eru stødd, tá verkfallið verður liðugt, sigur Karl Vidtfeldt